## Met-vinningur í Lotto

Ein heppin Lotto-spælari í Solrød í Danmark kann nú gleða seg til jólini. Um vikuskiftið setta Lotto nevnliga nýtt met, tá einsamallir vinnarin streyk avstað við ikki minni enn 24.648.344 kr. Enn hevur Danske Spil ikki hoyrt frá vinnaranum.

## Rooney í United til 2012

Í nýggja sáttmálan verður samstarvið millum Rooney og felagið økt við uppaftur tveimum árum, og sjálvandi er talan eisini eina munandi lønarhækkan.

– Hon endurspeglar framhaldandi arbeiði okkara við at byggja upp eitt lið sum heldur saman, segði United-venjarin, Alex Ferguson og nevnir í hesum sambandi Cristiano Ronaldo sum skrivaði undir nýggjan sáttmála í fjør.

— Vit síggja Wayne og Cristiano menna seg til heimsins bestu spælarar. Teir hava síni bestu ár frammanfyri sær, og vit eru heppin sum kunnu verða vitni til hetta, sigur Ferguson.





# Sjey róðu seg til NM

*Kapping í innieróðri var leygardagin, har føroyskir rógvarar høvdu møguleika at rógva seg til NM. Hesi 10 vunnu tær ymisku kappingarnar*

*Mynd: www.drekin.fo*

**Undankapping til NM í innieróðri var í vikuskiftinum, og her megnaðu sjey føroyskir rógvarar at rógva seg víðari til NM**

INNIRÓÐUR
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*

Høllin á Giljanesi var leygardagin karmur um kapping í innieróðri, sum Miðvágs Róðrarfelag skipaði fyri. Endamálið við kappingini var at geva føroyskum rógvarum ein møguleika at rógva seg til norðurlandameistaraskapin í innieróðri, sum verður á skránni tíðliga í næsta ár. Ein liðkapping var eisini á skránni á Giljanesi, har rógvarar, sum kanska ikki høvdu áhuga fyri NM-kappingini, kundu fara við til.

Luttøkan var hampiliga góð, og fleiri av føroysku rógvarunum kláraðu kravtíðirnar, sum Róðrarsamband Føroya hevði sett til kappingina. Tá kappingin var komin at enda var greitt, at sjey luttakarar kláraðu kravtíðirnar, og teir sleppa so við til NM í næsta ár. Teir sjey vóru: Gerda Olsen, Lis Elin Nielsen, Karl Danielsen, Búgvi Poulsen, Beinir Danielsen, Súsanna Skylv Sørensen og Heini Hátún.

### Vinnararnir í ymisku bólkunum:

| Nr. Navn | Teinur | Tíð |
|---|---|---|
| **Gentur 12 ár og yngri** | | |
| 1 Gerda Olesen | 500 m | 2.10.03 |
| 2 Hanna Hansen | 500 m | 2.13.00 |
| 3 Erla Johannesen | 500 m | 2.21.08 |
| **Dreingir 12 ár og yngri** | | |
| 1 Jóanis A. Nielsen | 500 m | 2.29.06 |
| **Gentur 13-14 ár** | | |
| 1 Lis Elin Nielsen | 1000 m | 3.54.02 |
| 2 Erla Jacobsen | 1000 m | 4.05.00 |
| 3 Sara Joensen | 1000 m | 4.41.00 |
| **Dreingir 13-14 ár** | | |
| 1 Bergur Johansen | 1000 m | 3.42.02 |
| 2 Ásmund Hansen | 1000 m | 3.54.07 |
| 3 Jaspur Jørgensen | 1000 m | 4.07.08 |
| **Gentur 15-18 ár** | | |
| 1 Sarita K. Hansen | 2000 m | 8.25.03 |
| **Dreingir 15-18 ár** | | |
| 1 Karl Danielsen | 2000 m | 6.39.06 |
| 2 Joen Petur Jacobsen | 2000 m | 6.50.00 |
| 3 Jóhan Dam | 2000 m | 6.55.00 |
| **Lættvekt kvinnur** | | |
| 1 Súsanna S. Sørensen | 2000 m | 7.19.01 |
| **Lættvekt menn** | | |
| 1 Búgvi Poulsen | 2000 m | 6.32.08 |
| 2 Beinir Danielsen | 2000 m | 6.36.09 |
| 3 Sigurd Nordendal | 2000 m | 6.41.03 |
| **Tungvekt menn** | | |
| 1 Heini Hátún | 2000 m | 6.20.04 |
| 2 Øssur Hansen | 2000 m | 7.11.05 |
| 3 Tórhallur Thomsen | 2000 m | 7.11.07 |
| **Kvinnur 35 ár og eldir** | | |
| 1 Ebba Jacobsen | 1000 m | 4.04.08 |
| 2 Anja Hansen | 1000 m | 4.32.01 |
| **Menn 35 ár og eldir** | | |
| 1 Jógvan H. Hansen | 1000 m | 3.42.00 |

TB-Dráttur 3-0 (25-15, 25-15, 25-11):

# TB bukaði oddaliðið

**TB snøgt sagt hølvaði Drátt av í meistaradeildini hjá kvinnum, og við sigrinum hava tær lagt seg undir liðuna á bæði Drátti og ÍF á ovastu rók**

KVINNUFLOGBÓLTUR
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*

Undan dystinum í Trongisvági lá Dráttur á odda saman við ÍF í bestu kvinnudeildini, meðan TB lá beint í hølunum á teimum bert tvey stig aftanfyri. Hesi bæði liðini hava tó ikki havt ta allarbestu gongdina síðstu dystirnar. Mikukvøldið tapti Dráttur á heimavølli fyri botnliðnum, Mjølni, men eisini TB tapti sín seinasta dyst, tá SÍ vann á teimum í Sørvági síðsta sunnudag. Tí høvdu bæði liðini brúk fyri stigunum fyri at koma aftur á røttu kós.

### Einki ivamál um sigurin

Toppdysturin í Trongisvági bleiv tó ongantíð spennandi. TB var snøgt sagt nógv betri enn Dráttur, og liðið úr Vágunum kom slett ikki við í dystin. TB legði hart út, og í fyrsta setti vunnu kvinnurnar av Tvøroyri 25-15.

Í øðrum setti fekk Dráttur somu viðferð. TB var aftur væl betri, og enn einaferð megnaði TB at hølva Drátt av. Úrsltið gjørdist aftur 25-15 til TB. So skuldu liðini bæði í gongd við triðja sett, og hetta vísti seg eisini at gerast síðsta settið í dystinum. Her fekk Dráttur ikki ein fót fyri seg, og TB vann heili 25-11 í síðsta setti.

Alt liðið hjá TB spældi ein ótrúliga góðan dyst. Tær løgdu stórt trýst á Drátt við góðum og høðrum servum, og so royndu tær at halda trýstið við ágangandi álopsspælið. Móttøkurnar hjá TB vóru eisini ótrúliga góðar, og tí blivu møguleikarnir hjá álopinum nógv størri. Í triðja setti valdi TB eisini at geva fleiri av heilt ungu leikarunum møguleikanum, og hesar kláraðu tað sera væl.

Hjá Drátti kom ósigurin illa við. Tær hava nú tapt tveir dystir á rað, og liðið sær ikki út til at koyra alt ov væl í løtuni. Leggjast skal tó afturat, at ein av royndu leikarunum. Helga Nordendal, hevur ikki verið við síðstu tveir dystirnar, men um hetta er grundin til tapini skal vera ósagt.